## Innlendismálaráðið

# Deildarstjóri til Náttúru- lendis- og umhvørvisdeildina í Innlendismálaráðnum

Við hesum verður søkt eftir deildarstjóra til Náttúru- lendis- og umhvørvisdeildina í Innlendismálaráðnum.

**Høvuðsuppgávur**
Høvuðsuppgávurnar hjá deildini verða í fyrstu atløgu at gera uppskot til lóggávu á náttúru-, lendis – og umhvørvisøkinum og at samskipa náttúrumál, lendismál og umhvørvismál umsitingarliga.

Harumframt skal deildin umsita ymsa lóggávu, eitt nú náttúrulóggávu, ognartøkulóggávu, matrikullóggávu, tinglýsingarlóggávu, lóggávu um fólkayvirlit, byggi- og býarskipanarlóggávu og umhvørvislóggávu.

Deildin fær ábyrgdina av føroyskari luttøku í altjóða samstarvi á náttúru- og umhvørvisøkinum.

**Førleikakrøv**
Tað er ein treyt, at umsøkjarar hava løgfrøðiliga ella fyri starvsøkið viðkomandi kandidatútbúgving og hava góðan kunnleika til føroyskt mál. Harumframt verður sett sum treyt, at teir hava hollar viðkomandi starvsroyndir.

Umframt omanfyristandandi verður væntað, at umsøkjarar duga og hava innlit í leiðslu, og at leiðsluhátturin er í samsvari við virðisgrundarlagið hjá miðfyrisitingini.

**Løn og setanartreytir**
Starvsheitið er deildarstjóri og verður lønt sambært 37. lønarflokki hjá tænastumonnunum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Setanartreytir annars verða sambært avvarðandi sáttmála.

Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Innlendismálaráðið**
Postrúm 159, Tinganes
110 Tórshavn

og skulu vera Innlendismálaráðnum í hendi í seinasta lagi 18. september 2006.

Umsøkjarar kunnu fáa nærri upplýsing um starvið við at venda sær til Rúna Joensen, aðalstjóra, á telefon 358080.

---

**Toll- og Skattstova Føroya**

# *Starv sum løgfrøðingur*

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 140 starvsfólk.

Økisskrivstovurnar røkja raksturin.

Stýrið tekur sær av yvirordnaðari planlegging, stýrings-, eftirlits- og menningaruppgávum, av sambandinum við Toll- og Skattaráðið, aðalráðini og landsstýrið, og virkar sum ráðgevi hjá økisskrivstovunum í løgfrøðiligum og øðrum fakligum spurningum um toll, skatt, meirvirðisgjald, onnur avgjøld og innheinting.

Í Stýrinum starvast 25 fólk.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara

www.tollskatt.fo

E-mail:

tollskatt@tollskatt.fo

Søkt verður eftir løgfrøðingi til Toll- og skattstovu Føroya, Stýrið, at seta skjótast til ber.

**Høvuðsuppgávur hjá fulltrúanum verða:**
- Løgfrøðiligir spurningar innan meirvirðisgjald, skatt, toll og onnur avgjaldsumráði, herundir eisini innkrevjing av almennari skuld
- at ráðgeva Toll- og skattstovuni kring landið í løgfrøðiligum spurningum innan umsitingarumráði stovnsins,
- at leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðandi ásetingar á skatta- og avgjaldsøkinum,
- at gera ummælir í kærumálum, dómsmálum, og
- at luttaka í lógarfyrireikandi arbeiði.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava cand. jur. útbúgving. Viðkomandi skal hava áhuga í at arbeiða innan skatta-, avgjalds- og innkrevjingarøkið, góð samstarvsevni, vera fyrikomandi og arbeiðssamur/-som. Fyrimunur kann vera, um umsøkjari hevur arbeiðsroyndir innan løgfrøðina á skatta- og avgjaldsøkinum.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis er fakliga krevjandi. Møguleiki er fyri eftirútbúgving.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búðskapar- og Løgfrøðingarfelagið.

**Setanarøki**
Núverandi setanarøkið er Stýrið, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Birtu Biskopstø tlf. 352600.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

**5. september 2006 kl. 12.00.**

Toll- og Skattstova Føroya
Stýrið
Postrúm 2151
FO-165 Argir

